# Ætla ikki at vakna við kaldan dreym

**Nú veruliga er stungið út í kortið fyri norðoyatunnlinum, eru klaksvíkingar farnir at fyrireika seg til nýggju tíðina. Mikukvøldið bjóðaði ein arbeiðsbólkur, sum skal gera eitt álit um ítrótt, mentan og frítíð, til fundar í býráðshøllini. Hesin bólkur er ein av 7, sum skal koma við tilmælum til býráðið um, hvussu Klaksvíkin skal tilbúgva seg til stóru avbjóðingina**



*Í arbeiðsbólkinum, sum skal taka sær av ítrótti, mentan og frítíð, sita, Eyðun Klakstein, Erik Biskopstø og Jastrið Gulaksen*

FUNDUR OG FYRIREIKING
*Rúna Sivertsen*

**Klaksvík:** Stórur áhugi var fyri fundinum um ítrótt, mentan og frítíð, sum var í býráðshøllini mikukvøldið. Um 70 fólk møttu á fundinum, orðaskifti var lívligt, og fólk smæddust ikki við at taka orðið.

Í desembur í fjør setti býráðið ein stýrisbólk at viðgera alt, sum hugsast kann í samband við fasta sambandið við meginøkið. Hesin bólkur gjørdi av at seta 7 arbeiðsbólkar, sum skulu koma við tilmælum til býráðið um, hvussu Klaksvíkin skal menna seg á øllum økjum og verða tilreiðar at taka ímóti teimum avbjóðingum, sum náttúrliga fara at koma, tá koyrandi verður undir Leirvíksfirði.

- Høvuðsendamálið við hesum arbeiðnum er at fyrireika Klaksvíkina, so vit ikki vakna við kaldan dreym, tá undirsjóartunnilin letur upp, sigur Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri.

## 7 arbeiðsbólkar

Bólkurin, sum skal gera álit um ítrótt, mentan og fritíð, var tann fyrsti av teimum 7, sum bjóðaði til fundar í býráðshøllini. Hvør bólkur verður mannaður við trimum fólkum.

Tað er Eyðun Klakstein, sum er formaður fyri hesum fyrsta trímannabólkinum. Hini eru Jastrið Gulaksen og Erik Biskopstø.

Eyðun er útbúgvin tíðindamaður og hevur verið fastur ítróttar- og tónleikaskrivari hjá Sosialinum í longri tíð. Eisini fæst hann við at geva út árbøkur um føroyskan tónleik. Við hesum royndum er hann júst rætti maðurin at taka sær av tí arbeiði, sum ætlanin er, at arbeiðsbólkurin skal gera.

Jastrið er grafiskur designari og hevur egið virkið. Hon er eisini ítróttarkvinna.

Eirik er lærari, men arbeiðir í løtuni hjá Útvarpi Føroya. Hann hevur í nógv ár fingist við tónleikaframleiðslu. Eisini hevur hann royndir sum samskipari av ymiskum mentanartiltøkum.

- Hinir bólkarnir verða settir í nærmastu framtíð við nøkrum vikum ímillum, sigur Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri, sum sjálvur er formaður í stýrisbólkinum.

Umframt ítrótt, mentan og frítíð, eru málsøkini, sum tilmæli skal gerast um, hesi: Handilsøkið, skúlaøkið, almanna- og heilsuøkið, tænastuøkið, fiskivinnuøkið og handverks-og ídnaðarøkið.

## Hugagott fundarfólk

Nógv góð hugskot komu fram á fundinum um, hvussu Klaksvíkin kann gerast ein spennandi býur hjá fólki í øllum aldri at búleikast í. Tað var breið semja um, at verður einki gjørt fyri trivnaðin hjá borgarunum, verður Klaksvíkin neyvan før fyri at halda unga fólki í býnum.

Jórun Høgnesen, forkvinna í mentanarnevndini hjá býráðnum, eggjaði feløgunum innan ítrótt, mentan og frítíð, til sjálvi at taka stig til at fáa til vega betur umstøður.

- Tað er ikki neyðugt, at kommunan fíggjar alt einsamøll; tað hevur hon ikki orku til. Í hvussu er fer tað at taka alt ov langa tíð, um bíðast skal eftir, at kommunan uppfyllir øll ynski. Men kommunan eigur sjálvsagt at vera við og stuðla teimum, ið vilja ganga á odda og taka eitt tak saman við okkum, segði hon.

Samanumtikið var hetta ein sera góður fundur, og verða klaksvíkingar eins hugagóðir og eldhugaðir á øllum økjum, sum tá tað kemur til ítrótt, frítið og mentan, er einki at ivast í, at Klaksvíkini verður lív lagað.

Sum Magnus Pauli Glerfoss vónríkur tók til á fundinum:

- Um tað so verða 6 breytir, fer streymurin kortini at ganga hendavegin, segði hann.



*Okkara egni Eyðun Klakstein er formaður í trímannabólkinum, sum skal gera tilmæli til býráðið um ítrótt, mentan og frítíð. Eyðun er útbúgvin tíðindamaður. Sum fótbóltspælari, ítróttar-og tónleikaskrivari er hann væl fyri at taka hesa uppgávu á seg*



*Um 70 fólk vóru samankomin í býráðshøllini í Klaksvík mikukvøldið, tá ítróttur, mentan og frítíð stóðu á skránni. Fólk vóru hugagóð og smæddust ikki at taka orðið*



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Dánial Mellemgaard 60 ár



Í dag, fríggjadagin 23. mai, verður Dánial Mellemgaard, sum er búsitandi í Herlev í Keypmannahavn, 60 ár. Hann er fólkaskúlalærari og starvast í Frederikssund, har hann hevur verið lærari á Åbjergskolen síðani 1987. Føðingardagin er hann í summarhúsunum, sum tey í mong ár hava havt við Sejrøbuktina.

Dánial hevur so at siga alla tíðina, síðani hann fyri umleið fjøruti árum síðani fór niður, búð uttanlands. Men hóast hann hevur verið burturi í tveir triðingar av tíðini, sum honum higartil hevur verið tilmáld, so roknar Dánial seg framvegis at vera føroying og serliga at vera svínoying og tað við stóra S. Hetta hóast hann bara var fimtan ára gamal, tá ið hann fór úr Svínoy og til Havnar at ganga í framhaldsskúla.

Dánial er sonur Ingrid og Henry Mellemgaard. Tey vóru bæði úr Svínoy. Hon var yngst av níggju børnum hjá Inger og Símuni Júst Jacobsen. Símun Júst, sum frá 1910 og til 1914 var tingmaður fyri Sambandsflokkin, var lærari í Svínoy, har hann eitt skifti eisini hevði úthandil fyri teir á Stongunum. Henry var í miðjuni í barnaflokkinum hjá Martu og Jákupi uppi á Heygum (hann var ættaður millum Garðarnar á Oyri). Tey áttu sjey børn.

Ingrid og Henry giftust í 1933. Tey bygdu á Geilalið í Svínoy, og í 1960 fluttu tey til Havnar, har tey búðu í raðhúsum í Langatúni, inntil teirra lívsskeið var lokið. Ingrid doyði 4. apríl í 1984, og Henry doyði 12. desember í 1990. Tey fingu fimm synir: Hans Jacob, Símun Júst, Jarvin, Dánial og Árnmar. Hans Jacob býr í Klaksvík, Símun Júst í Havnini og Árnmar á Argjum. Jarvin doyði longu í 1970. Hann var búsitandi í Keypmannahavn.

Dánial giftist í 1968 við Inger. Hon er ættað úr Keypmannahavn, men kortini fór Dánial ikki so langt at fáa sær konu. Tey bæði eru systkinabørn, tí pápi hennara, Óli, sum tíðliga í tíðini fór til Keypmannahavnar og lærdi til maskinmann hjá B&W, var beiggi Ingrid, mammu Dánial. Óli, sum seinnu árini arbeiddi á Orlogsværftinum, var giftur danskari konu, Åse, og tey fingu tvær døtrar. Hin eldra eitur Vivi. Kona Dánial, Inger, fylti 60 í mars.

Inger og Dánial eiga fimm børn: Eva, Vinnie, Jarvin, Henrik og Kristina. Henrik er búsettur í Havnini, Jarvin býr í Nuuk í Grønlandi, og genturnar eru allar á Keypmannahavnar leiðini.

Dánial leyk lærarapróg v á Københavns Dag– og Aftenseminarium í 1971. Hann var so eitt ár lærari í Keypmannahavn, og síðani gekk leiðin upp til Grønlands. Har var hann lærari í Maniitsoq (Sukurtoppinum) 1972–1975 og 1976–1983.

Skúlaárið 1975–1976 var Dánial lærari í Svínoy, sum hann heldur so ógvuliga nógv av. Hann er áhugaður í bygdini, fólkinum, sum búgva har og eru ættað hagani, og hann fylgir við í tí, sum gongur fyri seg har úti. Við framúr vøkru hondskriftini skrivar hann eina rúgvu av brøvum og kortum til Føroya, og altíð er tað við einum góðum orði úr Skriftini.

Eisini Inger er ættkær, hon skilir føroyskt og er áhugað í Føroyum og føroyingum. Tey hava vitjað av og á aftur henda vegin, og tey vóru í Svínoy síðsta summar, tá ið Malla hjá Edvardi, kona mammubeiggja hansara og pápabeiggja hennara, fylti hundrað ár.

Hjá Inger og Dánjal hava nógvir føroyingar sitið væl, og tey munnu vera mong, sum heilsa Dániali, nú hann fer um tey seksti.

**JH**

## Stjóri settur á Jarðfrøðisavnið



Sigurð í Jákupsstovu er settur sum stjóri á Jarðfrøðisavninum frá 1. juli 2003 og komandi 2 árini.

Stjórin á Jarðfrøðisavninum, Martin V. Heinesen, fer í farloyvi hetta tíðarskeiðið fyri at arbeiða við fyrireikandi kanningum til møgulig landgrundskrøv hjá Føroyum uttan fyri 200 fjórðinga markið.

Sigurð í Jákupsstovu, sum er 40 ára gamal, varð útbúgvin sivilverkfrøðingur frá Danmarks Tekniske Universitet í 1992, og hevur drúgvar royndir innan kolvetnisvirksemi.

Eftir lokna útbúgving arbeiddi Sigurð í Jákupsstovu sum verkfrøðingur hjá Maersk Olie og Gas í 5 ár, m.a. í Qatar og Indonesia.

Síðan 2001 hevur Sigurð í Jákupsstovu verið tekniskur leiðari hjá Atlantic Petroleum. Í desember 2002 vardi Sigurð PhD ritgerð við heitinum "Simulation of Gas Injection Processes" á Danmarks Tekniske Universitet.

## Finnbogi og Gunn viðurkenning frá Enjo International

3. mai 2003 var samkoma í auluni í Vestmanna Skúla. Møttir vóru 100 føroyskir brúkarar av umhvørvisligu Enjo vørunum. Eisini var stjórin fyri Enjo International, Johannes Engl, saman við Enjo umboðum úr Íslandi. Á samkomuni greiddi Johannes Engl frá um virksemi hjá Enjo, og íslendsku umboðini greiddu frá sínum royndum. Finnbogi Joensen í Vestmanna greiddi eisini frá sínum væl kendu umhvørvisroyndum í Vestmanna Skúla.

Vegna Enjo International gav Johannes Engl eina viðurkenning til Finnboga Joensen fyri sítt slóðbrótandi arbeiði innan umhvørvið og borgarstjórin í Vestmanna, Gunn Joensen, fekk eina viðurkenning fyri, at kommunan nýtur umhvørvisvinarlig vaskiamboð á øllum sínum deildum. 22 lond eru við í Enjo International.



*Johannes Engl og Gunn Joensen*



*Finnbogi Joensen og Johannes Engl*

## Karolina Johannesen á Tvøroyri 85 ár



Karolina Johannesen, f. Leo, á Tvøroyri fyllir 85 ár í dag. Karolina var fødd í Fámjin 23. mai 1918. Foreldur hennara vóru Elsebeth Maria Leo, f. Ludvig, úr Fámjin, og Johan Leo úr Vági.

14-ára gomul fór hon til Vágs at arbeiða. Um veturin tænti hon í húsi og um sumrarnar arbeiddi hon í fiski á Gørðunum. 19-ára gomul giftist hon við Albinius Johannesen av Tvøroyri, sum í dag er 91 ár, og eru tey kanska ta elsta parið í sóknini.

Karolina hevur verið eitt satt konubrot. Hon kundi arbeiða í fiski um dagin, seinnapartin hoyggjaði hon og um kvøldið arbeiddi hon í Turkihúsinum. Ikki hevur altíð veri so tespiligt at staðið í vaskikarinum á brúnni um vetrarnar í kavaroki og stormi. Øðrvísi varð tó tá vaskikjallarin og seinni flakavirkið hjá Niels Juul kom, og tær kundi standa innandura. Neyvan var nøkur teirra "sligin til Riddara av Dannebrog" fyri teirra avrik. Eftir at hon gavst at arbeiða í fiski, var hon tó mangt vikuskiftið úti og kokkaðist til veitslur ymsastaðni, til fyri fáum árum síðan.

8 børn fingu Karolina og Albinius: Olaf, Jonna, Edna, John, Elmar, Karl, Albert og Jens. Ikki hevur lívið altíð verið so smílandi. Olaf doyði við norskum línubáti í Noregi bert 35 ára gamal, John doyði av krabbameini 58 ár og Elmar bleiv avlamin 57 ára gamal av álvarsligari heilabløðing, allir sjómenn í bestu árum. Hóast hóttaføll á lívsleiðini kann Karolina gleðast um 15 ommubørn og 21- skjótt 23 langommubørn. Karolina og Albinius bygdu sær hús úti á Sevmýri og húsast tey bæði har einsamøll, og klára tey seg uttan stórvegis hjálp; tey hava stutt síðan fingið heimahjálp ein tíma um vikuna.

Sosialurin er ov lítil til at skriva ævisøguna hjá Karolinu so bert henda lítla heilsan um eitt hjartaligt tillukku á føðingardegnum.

## Brúdleyp

Hósdagin 22. mai *giftust* í Keypmannahavn Gisleyg Holm og Henrik Merkelsen.

Brúdleypsadressan: Prinsessegade 77, 5 th, 1422 København K.

## 85 ár

Í dag, 23. mai, verður Karolina Johannesen av Tvøroyri 85 ár. Hon er burturstødd.

## Dagurin

**23. mai. Desiderius.** Tvey halgimenni bera hetta navn. Annar var biskupur í Langres í Fraklandi, tikin av døgum í 364 ella 411. Hin var biskupur í Vienne í Fraklandi, steinaður til deyða í 608. Týdningurin er *hin ynskti.*